**Jørgen Niclasen**
**Landsstýrismaður**

# Svar

# upp á

# skrivligan fyrispurning nr. 32/2014 eftir tingskipanini § 52a frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, viðv. støðuni hjá støkum uppihaldarum undir forsorg og hjá somu, lutað í ymsar inntøkubólkar

## Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu nógv fær stakur uppihaldari við 2 børnum útgoldið í forsorg pr. mðr. og árliga brutto pr. 1. januar 2015?
2. Hvussu nógv rindar sami staki uppihaldari í lands-, kommunu- og kirkjuskatti og í AMEG-gjøldum, býr viðkomandi í Tórshavnar Kommunu?
3. Hvussu stóran barnafrádrátt í lands- og kommunuskattinum fær viðkomandi persónur og hvussu stór eru barnaískoyti og barnagjøld?
4. Vísandi til spurn. 1-3, hvussu stór er nettoinntøkan hjá viðkomandi pr. mðr. og fyri árið?
5. Um sami staki uppihaldari við tveimum børnum er løntakari, hvussu nógv hevur viðkomandi eftir netto, um inntøkan er 12.500 kr./mðr. ( t.e.150.000 kr. árliga), 16.666 kr./mðr. (t.e. 200.000 kr. árliga), 20.833 kr./mðr. (t.e. 250.000 kr. árliga) og 25.000 kr./mðr. (t.e. 300.000 kr. árliga)?
6. Kann landsstýrismaðurin greina gjøldini fyri ansing og fríplass, og hvussu hesi gjøld verða skipað fyri uppihaldarar, búsitandi í Tórshavnar Kommunu?

**Svar:**

**Sp. 1**
Sambært Almannamálaráðnum fær persónur, ið býr einsamallur og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni 14.695 kr. um mánaðin í forsorgarhjálp. Árliga verður sostatt talan um 176.340 kr.

**Sp. 2**
Sum víst í talvu 1 í svarinum til spurning 4, so verður samlaði skatturin áðrenn barnafrádrátt 4.655 kr. um mánaðin. Eftir barnafrádrátt er talan um samanlagt 2.239 kr. mánaðarliga.

**Sp. 3**
Barnafrádrátturin í landsskattinum er 6.500 kr. árliga fyri hvørt barnið, og barnafrádrátturin í kommunuskattinum í Tórshavnar Kommunu er 8.000 kr. árliga fyri hvørt barnið.

Vanliga barnagjaldið er 12.996 kr. um árið fyri hvørt barnið (tey við høgari inntøku kunnu tó verða áløgd at rinda eitt hægri gjald).

Barnaískoytið, sum allir stakir uppihaldarar fáa, er 6.588 kr. árliga í 2014, men hækkar frá 1. januar 2015 upp í 10.000 kr. árliga fyri hvørt barnið.

**Sp. 4.**
Sum víst niðanfyri, so verður nettoinntøkan 16.289 kr. um mánaðin ella 195.466 kr. um árið.

| ***Talva 1. Stakur uppihaldari við 2 børnum, sum fær forsorg*** | | |
|---|---|---|
| | *mð.* | *ár* |
| ***Forsorgarinntøka*** | ***14.695*** | ***176.340*** |
| Kommunuskattur | 2.469 | 29.634 |
| Kirkjuskattur | 73 | 878 |
| Landsskattur | 1.856 | 22.268 |
| AMEG | 257 | 3.086 |
| **Skattur samanlagt áðrenn barnafrádrátt** | **4.655** | **55.866** |
| Barnafrádráttur - Landið | -1.083 | -13.000 |
| Barnafrádráttur - Kommunan | -1.333 | -16.000 |
| **Skattur samanlagt eftir barnafrádrátt** | **2.239** | **26.866** |
| **Tøk inntøka eftir skatt** | **12.456** | **149.474** |
| Barnaískoyti | 1.667 | 20.000 |
| Barnagjald | 2.166 | 25.992 |
| **Tøk inntøka eftir skatt við ískoyti og barnagjaldið** | **16.289** | **195.466** |
| Ansingargjald | 0 | 0 |
| **Tøk inntøka eftir ansingargjald** | **16.289** | **195.466** |

**Viðm:** Forsorgarinntøka rindar ikki ALS-gjald og gjald til Barsilskipan.

**Sp. 5.**
Víst verður til talvu 2.

| *Talva 2. Stakur uppihaldari við 2 børnum, sum er løntakari* | | | | |
|---|---|---|---|---|
| ***Inntøka - mánaðarliga*** | ***12.500*** | ***16.666*** | ***20.833*** | ***25.000*** |
| Inntøka – ár | 150.000 | 200.000 | 250.000 | 300.000 |
| Kommunuskattur | 24.300 | 34.425 | 44.550 | 54.675 |
| Kirkjuskattur | 720 | 1.020 | 1.320 | 1.620 |
| Landsskattur | 17.000 | 27.000 | 37.000 | 47.000 |
| ALS | 1.875 | 2.500 | 3.125 | 3.750 |
| Barsilskipan | 930 | 1.240 | 1.550 | 1.860 |
| AMEG | 2.625 | 3.500 | 4.375 | 5.250 |
| **Skattur samanlagt áðrenn barnafrádrátt** | **47.450** | **69.685** | **91.920** | **114.155** |
| Barnafrádráttur - Landið | -13.000 | -13.000 | -13.000 | -13.000 |
| Barnafrádráttur - Kommunan | -16.000 | -16.000 | -16.000 | -16.000 |
| **Skattur samanlagt eftir barnafrádrátt** | **18.450** | **40.685** | **62.920** | **85.155** |
| **Tøk inntøka eftir skatt – árliga** | **131.550** | **159.315** | **187.080** | **214.845** |
| Barnaískoyti | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| Barnagjald | 25.992 | 25.992 | 25.992 | 25.992 |
| **Tøk inntøka við ískoyti og barnagjaldið - árliga** | **177.542** | **205.307** | **233.072** | **260.837** |
| **Tøk inntøka – mánaðarliga** | **14.795** | **17.109** | **19.423** | **21.736** |
| Ansingargjald - árliga | 0 | 0 | 2.229 | 37.150 |
| Ansingargjald - mánaðarliga | 0 | 0 | 186 | 3.096 |
| **Tøk inntøka eftir ansingargjald - mánaðarliga** | **14.795** | **17.109** | **19.237** | **18.641** |

***Viðm:** Viðvíkjandi ansingargjøldum, so verður mett, at talan er um eitt vøggustovubarn og eitt barnagarðsbarn.*

**Sp. 6.**
Ansingargjøldini í Tórshavnar Kommunu eru í 2014:

| | ***Pr. mð.*** | ***Pr. Ár (=11 mð)*** | ***Miðal Pr. mð (=Ár/12)*** |
|---|---|---|---|
| Vøggustovupláss | 2.463 | 27.093 | 2.258 |
| Barnagarðspláss | 1.530 | 16.830 | 1.403 |

***Viðm:** Rindað verður einans fyri 11 mánaðir um árið.*

*Avsláttarskipan*
Eru fleiri enn eitt stovnsbarn í húsarhaldinum verður systkinaavsláttur veittur, soleiðis at rindað verður 100% fyri tað bíligasta plássið og 75% fyri hini plássini.

Um vit sum dømi siga, at talan er um eitt vøggustovubarn og eitt barnagarðsbarn verður samlaða fulla gjaldið roknað soleiðis:

| | ***Tal*** | ***mð*** | ***Ár (=11 mð)*** | ***Miðal pr. mð (=ár/12)*** |
|---|---|---|---|---|
| Vøggustovugjald | 1 | (75%) 1.847 | 20.320 | 1.693 |
| Barnagarðsgjald | 1 | (100%) 1.530 | 16.830 | 1.403 |
| **Tilsamans** | **2** | **3.377** | **37.150** | **3.096** |

*Fripláss*

Fyri húsarhald har samlaða húsarhaldsinntøkan er lægri enn 247.900 kr. árliga, verður fult fripláss latið (óansæð um talan er um støk ella pør). So hvørt húsarhaldsinntøkan fer upp um 247.900 kr. skal vaksandi partur av ansingargjaldinum rindast. Fer húsarhaldsinntøkan upp um 292.900 kr. skal fult gjald rindast.

Fyri dømini í hesum fyrispurninginum verður gjaldið soleiðis:

| ***Húsarhalds-inntøka:*** | ***150.000 kr.*** | ***176.340 kr. (Forsorg)*** | ***200.000 kr.*** | ***250.000 kr.*** | ***300.000 kr.*** |
|---|---|---|---|---|---|
| Ansingargjald: | Onki gjald | Onki gjald | Onki gjald | 6% av fullum gjaldið | Fult gjald |

Fíggjarmálaráðið, 10. desember 2014

**Jørgen Niclasen,**

fíggjarmálaráðharri